# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Á gullbrúdleypsdegnum hjá Petrinu og Frank

*So fitt tey eru, nú gullbrúdleypsdag tey feira.*
*Fimmti ár saman, ja við gleði og gaman,*
*seks børn bleiv tað til, fýra gentur fyrst. ha*
*So tveir bassar, tað vóru knassar…ha*

*Takk fyri lívið sum tit okkum góvu.*
*Vóni ikki vit vóru ov strævin.*

*Takk fyri ógloymandi túrar úti á Marknagili.*
*Uppi á Kleynisvarða niðan á Syðradalsskarð*
*ella úti í Havnardal.*

*At svimja vit tíðliga lærdu.*
*Alt tykkum at takka*
*sum við okkum vóru.*

*Góða mamma og babba*
*hjartaliga tillukku*
*Gud signi tykkum.*

**Børnini**

## Andlát og jarðarferðir

**Elias Joensen,** Tórshavn, ættaður úr Froðba, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 74 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum heim í Ebenezer mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 14.

Tey, ið vilja minnast Elias kunnu lata Epileptikarafelag Føroya eina pengingagávu, konto í Føroya Sparikassa.

**Hans Clementsen,** vanliga nevndur Hans í Andarisa, ættaður av Sandi, búsitandi á Seyðisfirði, andaðist 13. juni, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr kirkjuni á Seyðisfirði leygardagin 18. juni.

*Kelda: Útvarp Føroya*

# Norðurlendskt summarskeið á Føroyamálsdeildini



*Norðurlendsku studentarnir á summarskeiði á Føroyamálsdeildini.*
*Aftara rað f.v.: Jógvan í Lon Jacobsen, skeiðleiðari, Arve Berntzen, Guðmundur Björgvin Svafarsson, Kendra Willson, Anne Toija, Gunilla Björkander, Anna Ulfhielm, Katja Rothsten, Jaana Kettunen, Marianne Gärdesmed, Anne-Louise Ottosen, Ásta Kristín Benediktsdóttir, Karin Borell, Jorunn Ådnøy.*

*Fremra rað f.v.: Marlene Petersen, Lena K. Skaalbones, Maarit Fredlund, Harriet Eriksson, Noora Räsänen Else Berit Molde og Jenny Holmén.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í hesum døgum verður summarskeið hildið í Føroyum. Skeiðsluttakararnir eru studentar, ið lesa norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir í Norðurlondum. Hesa ferð eru 20 studentar á skeiðinum, sum byrjaði 1. juni og endar 24. juni**

### Summarskeið

Tað er Norðurlendska ráðharraráðið, ið fíggjar skeiðið. Líknandi skeið verða eisini hildin í øðrum Norðurlondum, har føroyskir studentar kunnu vera við. Endamálið við hesum skeiðunum er at kunna um tey norðurlendsku málini og læra um bókmentirnar og mentanina í teimum ymsu londunum.

Ofta fáa nakrir av hesum studentunum so stóran áhuga fyri føroyskum, at teir koma aftur seinni og búgva tá ofta eitt longri tíðarskeið í Føroyum og læra seg betur føroyskt. Og tá hesi fólkini fáa starv á universitetunum, eru tey før fyri at hava skeið í føroyskum. At tað eru fólk, sum hava førleika at undirvísa í føroyskum uttan fyri landoddarnar, hevur sjálvandi sera stóran týdning fyri kunnleikan um føroyskt mál uttanlands.

Hesa ferð koma studentarnir úr Danmark, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Íslandi. Seinni í ár verður eitt altjóða skeið í føroyskum fyri fólk uttan fyri Norðurlond. Og tað tykist at vera stórur áhugi millum útlendingar fyri at læra seg føroyskt og at fáa innlit í føroyskar bókmentir og mentan yvirhøvur, siga tey á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

i
Sosialurin